# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*– Trygdin hjá ferðafólkunum kemur fram um alt annað*

*(bretska loftferðslueftirlitið)*

STUTT SAGT

## Stórur vandi fyri yvirgangi

Síðani bretsku myndugleikarnir avdúkaðu eina ætlan hjá yvirgangsmonnum at spreingja fleiri ferðamannaflogfør á flogi, hava myndugleikarnir í fleiri øðrum londum hert tilbúgvingina.

Soleiðis er í Fraklandi, og í gjár segði Nicolas Sarkozy, innanríkisráðharri, at vandin fyri yvirgangi í Fraklandi er bæði stórur og støðugur. Hann segði, at fronsku trygdartænasturnar eru tilbúnar, og hann heitti á franska fólkið um at hava eygu og oyru opin.

Síðani avdúkingina í Bretlandi hava fronsku myndugleikarnir hert eftirlitið við øllum flogførum, sum fara til USA, Bretlands og Ísraels, skrivar AFP úr París. Í dag skuldu innanríkisráðharrarnir í ES-londunum hittast at umrøða støðuna.

## Sviar ávaraðu ikki norðmenn

Tann 25, juli virkaðu tveir av generatorunum á kjarnorkuverkinum í Forsmark í Svøríki ikki, og hóast óhappið ikki elvdi til leka, verður tilburðurin mettur sum sera álvarssamur.

Nú fýlast norsku myndugleikarnir á, at teir ikki fingu boð um óhappið í Forsmark, skrivar blaðið VG. Kjarnorkuserfrøðingurin Niels Bøhmer sigur við blaðið, at ein leki á verkinum í Forsmark hevði fingið nógv størri avleiðingar fyri Noreg, enn vanlukkan í Tjernobyl hevði á sinni.

Norsku myndugleikarnir vísa á, at sambært einum nýggjum norðurlendskum sáttmála skulu Norðurlond ávara hvørt annað, um nakað álvarssamt er á vási, men tað gjørdu sviar kortini ikki. Kanska mettu teir ikki óhappið nóg álvarssamt, men ta umberingina halda norðmenn ikki vera rætta. Tí fara teir at spyrja svensku myndugleikarnar um málið, skrivar VG.

## Róku á havinum í mánaðir

Tríggir meksikanskir fiskimenn eru komnir afturíaftur í øllum góðum, eftir at leitað hevur verið eftir teimum í mánaðir.

Teir tríggir menninir fóru við einum átta metrar longum báti at fiska háv í Kyrrahavinum, men longu tann fyrsta dagin fingu teir trupulleikar við motorinum og róku til havs. Fyri nøkrum døgum síðani kom eitt skip fram á teir nærhendis Marshalloyggjunum. Menninir vóru illa á holdum komnir, men hava tað gott eftir umstøðunum, verður sagt.

Tann stóri spurningurin tykist vera, hvussu leingi teir hava rikið á havinum. Sambært einum blaði fóru teir til fiskiskap tann 28. oktober í fjør, men tíðindastovan Notimex sigur seg hava fingið at vita frá næstringum teirra, at teir hava verið burturi í tríggjar mánaðir.

Menninir hava greitt frá, at teir hava livað av regnvatni og fiski, og at tvær ferðir var báturin um at søkka. Ta einu ferðina fingu teir ongan bita í tvær vikur, siga teir.

# 20.000 kuffert horvin



Umleið 20.000 kuffert eru ikki komin vegin fram, síðani myndugleikarnir í Bretlandi avdúkaðu yvirgangsætlaninar ímóti flogferðsluni

**Tey herdu trygdartiltøkini í flogferðsluni hava elvt til nógvar trupulleikar. Eitt nú leita fólk eftir viðføri sínum**

Síðani myndugleikarnir í Bretlandi avdúkaðu ætlaðu atsóknirnar at ferðamannaflogførum, eru trygdartiltøkini í fleiri floghavnum herd munandi. Tað hevur havt við sær, at ferðafólk noyðast at standa leingi í bíðirøð, fleiri rutur eru avlýstar, meðan aðrar eru seinkaðar.

Tey herdu krøvini til hondviðførið hava eisini víst seg at hava sínar avleiðingar, og ein teirra er, at kuffert í túsundatali hava hópað seg upp í ymsum floghavnum í seinastuni. Sambært svenska blaðnum Expressen eru umleið 20.000 kuffert ikki komin vegin fram, og nú hevur British Airways gjørt av at leiga flutningsflogfør til at flyta tey nógvu kuffertini ril Bretlands.

Ferðafólk og ferðaskrivstovur eru sera misnøgd við framferðina hjá bretsku eftirlitsmyndugleikunum. Sagt verður, at myndugleikarnir hava alt ov fá starvsfólk til at avgreiða viðførið hjá fólki, og at myndugleikarnir tí ikki hava lagað seg til tær broyttu umstøðurnar.

Flogfelagið Ryanair umhugsar sambært Sky News at fara til dómstólarnar við málinum. Stjórin, Michael O'Leary, sigur við sjónvarpsstøðina, at tey vita ikki annað at gera enn at fáa dómsvaldið at noyða stjórnina í London at fáa viðurskiftini í floghavnunum í rættlag.

Eftirlitsmyndugleikarnir hava svarað, at teir gera alt, sum stendur í teirra makt fyri at nøkta krøvunum hjá flogfeløgunum.

– Men vit seta trygdina hjá ferðafólkunum fram um alt annað, sigur talsmaðurin hjá myndugleikunum við Sky News.

# Stórbýir huldir í royki

**Á oyggjunum Borneo og Sumatra verða stór skógarøki brend fyri at gera pláss fyri landbúnaði, og tann nógvi roykurin ger tað næstan óliviligt í fleiri býum.**

Indonesisku myndugleikarnir boðaðu í gjár frá, at teir noyðast at lata fleiri almennar skrivstovur og skúlar á Sumatra aftur, tí tað er ikki verandi har fyri roykinum frá teimum stóru skógareldunum. Á Borneo, sum er undir indonesiskum og malaysiskum ræði, er støðan lítið mætari.

Tann nógvi roykurin ávirkar eisini gerandisdagin í fleiri av teimum stóru býunum har um vegir. Í Singapore og malaysiska høvuðsstaðnum Kuala Lumpur er roykurin so nógvur, at tað ávirkar heilsuna hjá fólki, skrivar Reuters. Indonesisku veðurmenninir hava biðið myndugleikarnar taka stig til at steðga skógarbrenningini, tí hon kann fáa álvarssamar avleiðingar, tá regntíðin kemur í oktober, siga teir.

Bæði í Indonesia og Malaysia hevur roykurin darvað ferðsluni, og fremmand ferðafólk í túsundatali hava avlýst sínar ferðir til tey dálkaðu økini. Harafturat hevur roykurin órógvað flogferðsluna.

Indonesiski forsetin, Susilo Bambang Yudhoyono, hevur lovað at fáa góðseigararnar at gevast við skógarbrenningini, men sambært Reuters hevur hann ilt við at fáa teir lokalu myndugleikarnar at fullføra boðini.